# Føroya Bjór byggir goymslubygning

Føroya Bjór hevur fingið byggiloyvi til goymslubygning frá Tórshavnar kommunu. Føroya Bjór hevur tvey grundstykki í Havnardali. Tórshavnar kommuna sigur, at fyritøkan noyðist at byggja á grundstykkjunum, annars fara hesi aftur til kommuna. Einar Waag, stjóri á Føroya Bjór, greiðir frá, at bygningurin fer at avlasta goymsluna í Klaksvík. Bygningurin verður einar 600 kvadratmetur, ið er 100 kvadratmetur størri enn goymsluna, ið longu er í Tórshavn.




# Minni álit á búskapin

Treystitalið hjá føroyska brúkaranum fall í juni mánaði úr 24 niður í -5 stig, skrivar Fíggjarmálaráðið á heimasíðu sínari. Fallið í samlaða treystitalinum sæst aftur í tilfeingisvinnuni við færri bíleggingum og útlitum fyri minkandi framleiðslu komandi árið. Tænastuvinnan hevur havt framgongd og vøkstur í eftirspurninginum, men vøksturin er minni nú enn hann hevur verið. Føroyski brúkarin metir, at arbeiðsloysið fer at vaksa, men hann væntar eisini, at hansara privata fíggjarstøða fer at versna og at hann fer at spara minni saman komandi árið.

# Umfatandi herverk í Lamba

**Tvær ferðir innan stutta tíð er herverk framt á eini hús í Lamba. Løgreglan stendur á berum og eigarin stendur spyrjandi eftir**

HERVERK
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Tvær ferðir innan heilt stutta tíð er herverk framt á eini sethús í Lamba. Fyrru ferðina var á summarmála 21. juni, tá fleiri rútar á síðuni oman móti vegnum vórðu knústir í kjallaranum og í stovuhæddini. Løgreglan veit ikki, hvør gerningsmaðurin ella gerningsmennirnir eru, og eigarin, Bjørn Finnsson, ivast í hvør orsøkin man vera til at hetta herverkið er framt.

- At tað hendir einaferð er sjálvandi keðiligt, men slíkt hendir av og á. Húsini eru tryggjaði, og tryggingin tók við, soleiðs at allir rútarnir vóru skiftir, sigur Bjørn Finnsson.





*Umfatandi herverk er framt á hesi húsini tvær ferðir seinasta mánaðin. Løgreglan stendur enn á berum*
Mynd: Jens Kristian Vang

## Ivast í motivinum

Men longu leygardagin, 5. juli, varð aftur ein rútur knústur í kjallaranum. Allir rútarnir vóru júst tiknir burtur og nýggir settir í, og húsini vóru aftur nýtilig. Men tá sonur Bjørn Finnsson, Bergmann Finnsson, kemur á staðið aftur leygardagin eftir, er aftur ein rútur knústur, og steinurin liggur á kjallaragólvinum. Húsini eigur Bjørn Finnsson, sum býr í Kvívík. Hann hevur leigað húsið út til Jehova Vitni, og hann ivast í, um hetta hevur nakað við málið at gera.

- Eg veit ikki, um tað at Jehova Vitni eru í húsinum, hevur nakað við málið at gera. Har eru jú summi, sum hava ilt av trúðarbólkinum, og ivasamt er, um hetta er orsøkin til herverkið. Eg veit tað ikki, men hetta er væl hugsandi, greiðir Bjørn Finnsson frá.

Løgreglan stendur á berum í málinum, sigur Bjørn Finnsson, og gerningsmaðurin ella gerningsmennirnir eru enn ókendir.

## Ikki fyrstu ferð

Herverkið, sum nú er framt á húsini, er ikki tað fyrsta, ið Bjørn Finnsson hevur verið úti fyri við hesum húsunum. Har hevur fyrr verið innbrot, tá ein tjóvur fyrst royndi at bróta seg inn gjøgnum kjallaran, men varð forðaður av gólvlemminum í uppgongdini. Hann gavst tó ikki so, og soraði rútin í høvuðsdyrnum, og slapp so inn tann vegin, og slapp avstað við nakað av brennivíni, ið stóð í húsunum. Tað málið er tó uppklárað, og gerningsmaðurin er tikin.

- Tað er rættiliga keðiligt at koma út fyri slíkum. Eg búgvi í Kvívík hjá konuni, og havi tískil langan veg at koyra til húsini. Tí er tað rættiliga keðiligt, at eg ikki kann føla meg tryggan við, at húsini hava tað gott, og at sonur mín, Bergmann Finnsson, sum býr á Glyvrum, verður noyddur at hava eftirlit við húsunum. Ein skuldi trúð at sovorið fekk frið, men soleiðs er bara ikki, fortelur ein harmur Bjørn Finnsson at enda.

# Ætla ikki at sleppa søluni

**Hóast Atlantic Airways hevur mælt til, at tollfría sølan verður flutt niður á jørðina, so merkir hetta á ongan hátt, at tey vilja sleppa hesum parti av inntøkugrundarlagnum**

HANDIL
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fyri stuttum varð staðfesta, at Vága Floghavn nú fær rætt at hava tollfríðar sølubúðir á Flogvøllinum.

Ferðaskrivstovan 62 Norður hevur longu avtalu við Floghavnina um, at bert tey kunnu reka cafeteria og kiosk á Flogvøllinum, og tí siga tey seg meta, at tey longu hava einkarætt at reka tollfría sølubúð á flogvøllinum. Hetta visti Útvarpið at siga í gjár.

## Atlantic vil ikki sleppa

Kitty May Ellefsen, nevndarformaður fyri Vága Floghavn, segði við Útvarpið, at tey ikki meta sáttmálan við ferðaskrivstovuna fevna um tollfríar sølubúðir, og tí fer Vága Floghavn í næstum undir at byggja tvær sølubúðir.

At talan nú verður um tollfría sølu á landjørðini er eftir tilmæli frá Atlantic Airways, sum hesar seinastu mánaðirnar hevur roynt at endavent øllum hugsandi hættum at spara olju uppá.

Ein av hesum er at flyta tollfríu søluna niður á jørðina, og hetta hevur tvinnar orsøkir, sigur Magni Arge.

- Partvíst er hetta fyri at minka um $CO_2$ útlátið fyri hvørt ferðafólkið. Bæði tí hetta sparir eitt fólk umborð, og tí vit tá hava minni vekt umborð. Tað er eisini tað, sum er hugskotið við, at fólk eisini sleppa at keypa tollfrítt, eftir at tey eru lend. Tá nýtist teimum heldur ikki at taka fleiri kilo av tollfríum við sær umborð á flogfarið, tá flogið verður heim. Og tað er á heimferðini, at størsti parturin av tollfríu søluni hevur verið, sigur Magni Arge.

- Men tað er klárt, at hetta eisini er ein partur av inntøkugrundarlagnum hjá okkum. Og tí dugi eg ikki at síggja nakra orsøk til, at eitt cafeteria á Flogvøllinum nú skal hava inntøkurnar av hesum.

- Tí umframt umhvørvisliga partin av hesum, so hevur hetta málið eisini eina fíggjarliga síðu. Hon er, at vit fegin vilja hjálpa við til at skapa nakrar inntøkur til flogvøllin. Tí inntøkur skulu eisini til hjá flogvøllinum, og kunnu tær ikki fáast aðrar vegir, so enda tann rokningin hjá okkum. Og harvið eisini hjá ferðafólkunum. Og tí er rokningin við tollfríu søluni eisini sera einfalt. Antin verður hetta framhaldandi ein partur av grundarlagnum hjá okkum, ella eisini endar rokningin uppi á ferðaseðlunum, sigur Magni Arge.



Mynd: Magni Arge
*Stjórin í Atlantic Airways hevur ongan tíð havt ætlanir um, at flogfelagið skal sleppa tollfríu søluni, fyri tí um hendan ikki longur gongur fyri seg umborð á flogførunum*